# FORELDRAFUNDUR Í 2. UNDIRVÍSINGARPARTI

– Læraravegleiðing

## Innihald:

Bakgrund
Foreldrafundur

## Bakgrund

Næmingarnir eru í ferðsluni einsamallir og saman við øðrum á sínum aldri. Nøkur teirra súkkla eisini. Tað er ofta í hesum aldri, at tey verða meira tilvitað um útsjónd, og hvat er smart.

## Foreldrafundur

Greiðið frá, hvat tit arbeiða við í ferðslu.

Avbjóðingarnar eru aðrar, nú næmingarnir eru vorðnir eldri. Fleiri av teimum halda, at hjálmur er "ókul"og lata vera við at brúka hann.

Eru tit ikki farin undir at undirvísa í ´At súkkla,´ greiðið frá, at foreldrini fáa brævi, tá ið tit fara at gera tað. Í brævinum verður heitt verður á foreldrini at gera súkkluvenjingar við børnunum, um børnini súkkla.

Vísið á, at hóast nakrir næmingar kanska ikki súkkla, er týdningarmikið, at tey læra, hvørjar reglurnar eru, tá ið súkklað verður, og hvussu týdningarmikið tað er at vera ansin á súkklu í ferðsluni. At tey verða lærd, hvussu tey skulu súkkla er við til at búgva næmingarnar til ferðsluna. Um nøkur ár fara nøkur teirra eisini at koyra prutl. **GG! til prutl krevst koyrikort.**

Í hesum aldri eru eisini mong, sum gevast at brúka endurskin. Greiðið frá, at tit undirvísa í, hvussu týdningarmikið endurskin er.

**Tit kunnu vísa á hetta á foreldrafundinum:**

- Við góðkendum endurskini síggjast vit í minsta lagi 140 metrar burturfrá, tá ið bilur hevur nærljósini tendrað. Bilførarin hevur 10 sekund at síggja okkum og umráða seg, um hann koyrir 50 km/t.
- Við ongum endurskini síggjast vit í fyrsta lagi 25 m burturfrá, og tá hevur bilførarin 2 sekund at síggja okkum og umráða seg, um hann koyrir 50 km/t. Hetta kann vera munurin millum lív og deyð.

Hava foreldrini ikki sæð pinkuhjálmin áður, kunnu tit vísa teimum hann.